# ... Tunlar størsta hóttan móti samgonguni



*Jóannes Eidesgaard viðgongur, at hetta fyrsta tíðarskeiðið við nýggjari samgongu hevur verið munandi strævnari enn vanligt. Hann vónar, at arbeiðslagið hjá samgonguni fer at batna í nýggju tingsetuni eftir Ólavsøku*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Og tað koma at henda onnur frambrot. Politikkurin er rættur, sjálvt um Ingeborg Vinther ikki sær tað á sama hátt, sum vit onnur. At tað kemur kapping upp á arbeiðsmegi uttanífrá, er sjálvandi ein nýggj støða fyri Ingeborg Vinther, og tað setir onnur krøv til hennara sum fakfelagsleiðara.

## Brotin vallyfti

*Valstríðið koyrdi nógv upp á gransking og mentan, men hetta sæst ikki nógv aftur til í fíggjarlógini. Hava tit ikki brotið eitt vallyftir her?*

- Nú ert tú skjótur at døma. Tað er ikki rætt, at granskingin hevur verið fyri vanbýti, tí vit fáa meiri gransking á fiskivinnuøkinum og á vinnuøkinum. Tað er rætt, at Kristina Háfoss fekk valið ímillum at lyfta granskingina ella útbúgvingina. Hon valdi so at gera nakrar uppraðfestingar á Fróðskaparsetrinum, tí pengar vóru ikki til bæði. Í nýggja lestrarárinum verða fýra nýggj útbúgvingartilboð har sett á stovn. Tað er nú einaferð so, at tú verður noyddur at raðfesta, og hon valdi so at gera tað á Fróðskaparsetrinum. Men tað er ikki so, at granskingin hevur mist pengar, men kanska er hon ikki uppraðfest so nógv, sum granskingin sjálv ynskir.

*Í undanfarna valskeiði brúktu tit nógva orku at formulera eina Visjón 2015. Hesa hava vit onki hoyrt til í nýggju samgonguni. Er visjónin deyð?*

- Nei, tað er hon ikki. Eg kundi øgiliga gjarna hugsa mær, at vit í heyst fingu eitt aðalorðaskifti um visjónina, tí hon er ongantíð meiri aktuell enn júst nú.

*Hvussu ber tað til, at vit hava hoyrt so lítið um visjónina teir fyrstu 120 dagarnar. Er tað ikki júst nú, tit skulu leggja lunnar undir hana?*

- Eg haldi, at fleiri av teimum tingunum, vit hava sæð í orðaskiftinum, eitt nú á umhvørvisøkinum, eru beinleiðis tikin úr visjónini, so hon livir sítt fríska lív.

*Eitt annað, sum nýggja samgongan hevur sett sær fyri, er at skerja blokkstuðulin við 117 mió. krónum. Tá tú so hugsar um tær ovurhondsstóru íløgur, ið skulu gerast og at rakstrarútreiðslurnar eru vaksandi; hongur tað so yvirhøvur saman at skerja blokkstuðulin í sama tíðarskeiði?*

- Hatta var ein øgiliga sambandsligur spurningur. Um tú hevur hasa fatanina, at vit ongantíð fara at lækka blokkin, uttan so vit finna eitt stað at brúka hesar pengarnir til, so koma vit ongantíð at gera tað. Tað er væl eisini ein spurningur um at hava eina kós ímóti einum meiri sjálvberandi búskapi. Allir flokkar eru samdir um at miðja ímóti einum búskapi, sum er leysur av gjøldum aðrastaðni frá – eisini Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin. Men okey, tað er rætt sum tú sigur, at tá hetta við blokkniðurskurði so verður gjørt, er tað týdningarmikið at gera tað soleiðis, at tú ikki loypir hvøkk í alt samfelagið. Tí eri eg glaður fyri, at vit fingu í samgonguskjalið, at politisk tiltøk skulu gerast út frá tí búskaparligu støðu, sum er galdandi í samfelagnum. Hetta merkir, at tá vit í 2010 eru komin til at skerja blokkin, so mugu vit eisini hava eina fíggjar- og búskaparstøðu sum ger tað gjørligt at gera tað, soleiðis at hetta ikki rennir samfelagið út í ein skelk av hesi orsøk.

## Ongantíð aftur ongar kvinnur

*Tú hevur tríggjar kvinnur í hesum landsstýrinum. Hvussu ávirkar tað arbeiðslagið í samgonguni?*

- Tað frøðir meg, at eg fekk rætt í tí spádóminum, at undanfarna landsstýri nokk bleiv tað seinasta, har ongin kvinna var. Eg ivist heldur ikki í, at tað bleiv tað seinasta landsstýri við bara monnum. Tað er gott, at vit fingu lyft upp í okkara javnstøðuviðurskiftum, og eg eri sera fegin um, at vit hava fingið kvinnur í landsstýrið. Oftani fær man tað mest nyanseraðu myndina av trupulleikum og loysnum, tá tað er eitt samanspæl millum kynini bæði. Tá vit sita rundan um borðið her í Tinganesi, er tað rættiliga týðuligt, at kvinnurnar oftani síggja mál øðrvísi, enn vit menn traditionelt gera.

*Nú hevur tú sitið góðar 120 dagar sum løgmaður í eini nýggjari samgongu. Hvussu ert tú nøgdur við hetta tíðarskeiðið?*

- Má viðganga, at tað hava verið nokkso strævnir dagar. Eg vóni, at vit fáa møguleikar nú fram móti ólavsøku, tá vit leggja á aftur, at finna okkum sjálvi og fáa arbeiðið at glíða eitt sindur betri, enn tað hevur gjørt. Vit hava brúkt alt ov nógva orku upp á tunnilsmálið. Tað er eitt rættiliga breitt forstáilsi fyri málinum, men eg haldi ikki, tað er rætt at brúka alla okkara orku at umrøða tunlar, tí vit hava so nógv onnur mál, sum bíða eftir okkum.

*Men ert tú komin har til, sum tú ætlaði tær hetta fyrsta tíðarskeiðið?*

- Tað haldi eg. Vit hava fingið loyst nøkur veldug mál, sum útlendingamálið og skúladepilin í Marknagili, umframt at vit hava fingið sett hol á nøkur mál, so eg haldi, vit eru komin væl frá byrjan.

*Hevur tað verið strævnari at vera løgmaður nú, enn tað var í undanfarna valskeiði?*

- Nú vóni eg ikki, at tú sært tað á mær, men tað hevur verið nokkso strævið, ja!

*Hvussu fært tú luft, og hvussu slappar tú av?*

- Eg minnist undir samgongusamráðingunum, at vit fyrst brúktu eina viku upp á at samráðast við flokkarnar í undanfarnu samgongu og síðani eina viku upp á hesa. Tá segði Hans Pauli Strøm við meg, at nú helt hann, at eg skuldi taka mær nakrar dagar frí, tá alt var komið upp á pláss. Teir dagarnar havi eg enn ikki tikið, tí tað alla tíðina hava verið mál, sum eg skal avgreiða ella grípa inn í. At vera løgmaður er strævið og torført at forútsíggja, nær man kann halda frí. Tað veit man, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Hann sigur seg vóna at fáa nakrar frídagar millum Jóansøku og Ólavsøku.

Síðani samrøðan varð gjørd, er løgmaður komin út í nýtt illveður. Hesaferð er tað ikki um undirsjóvartunlar, men um fíggjarligu karmarnar á Landssjúkrahúsinum, har hann hevur loypt øði í alla leiðsluna, sum í vikuskiftinum hótti við at leggja frá sær. Hetta kom tó ikki so langt ...enn í hvussu er.